# Blomstrini hóra undan

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitin millum +3 stig um dagin og ÷2 stig um náttina.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men um kvøldið kavaælingur. Hitin millum +3 stig um dagin og ÷2 stig um náttina.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum ÷3 stig og frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

**Nú eru tey fyrstu blomstrini so smátt farin at spíra. Hóast kavin legst aftaná, at teir fyrstu spírarnir hava kagað fram, so hóra blomstrini vanliga undan, tí tey eru so harðfør, sigur urtagarðsmaður hjá Hjálpirót**



*Tær fyrstu vøkru páskaliljurnar eru farnar at spíra og seta sín litfagra dám á urtagarðar í býnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

VÁR
*Stefan í Skorini*

Tey fyrstu blomstrini eru farin at spíra og stuttligt er at síggja vakra litin í tí annars heldur karga umhvørvinum.

Tað er kanska eitt sindur óheppið, at hann brennir á við kava, beint eftir at fyrstu blomstrini hava víst seg undan moldini. Men Torben Schneider, cand. cort., ið arbeiðir sum urtagarðsmaður í felagnum Hjálpirót, sigur, at eingin vandi er á ferð, bert um kavin ikki legst so tjúkkur.

– Tey flestu føroysku blomstrini eru harðfør og reisa seg aftur, tá kavin tiðnar. Tey hava lagað seg eftir føroyska veðurlagnum. Tí er eingin orsøk til at vera bangin fyri, at blomstrini blóma ov tíðliga á árinum, sigur Torben.

Kavin órógvar annars teirra arbeiði nógv og ikki fæst nógv av skafti, meðan kavin liggur.

Torben sigur seg hava lagt til merkis, at stórur munur er á, nær tey fyrstu blomstrini spíra niðri í býnum og á búðplássum, ið liggja hægri uppi.

– Eg búgvi uppi í Hoyvík, og blomstrini spíra nógv seinni her enn niðri í býnum, har tey fyrstu longu spíra. Orsøkin er tann einfalda, at tað er kaldari longri uppi, og vindurin er meira bítandi, sigur Torben.

Torben sigur, at hann sum urtagarðsmaður leggur merki til, at fólk eru farin at vakna aftur úr dvalanum. So skjótt ein sólskinsdagur var, so gløddi telefonin hjá teimum, tí fólk aftur eru farin at hugsa um urtagarðin.

– So skjótt okkurt vísir seg í urtagarðinum, so fáa fólk hugin til tað arbeiðið aftur, sigur Torben.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 4 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 17 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 30 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. Yvir Suður-Skandinaviu stendur mestsum í stað.




Millum hátrýstið við Ísland og lágtrýstið yvir Suður-Skandinaviu rekur køld luft framvegis móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/03 kl. 06⁰⁰–15/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,5°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 14/03 kl. 06⁰⁰–15/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 31,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

16. mars: Seinna kvarter
20. mars: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. mar | — | 12.16 | 11.16 | 23.54 | 11.31 | — | 01.39 | 14.16 | 02.39 | 15.16 | 10.31 | 23.09 | 09.31 | 22.09 | — | 12.31 | 00.54 | 13.31 | — | 12.01 | 00.39 | 13.16 |
| 17. mar | 00.54 | 13.32 | — | 12.32 | 00.09 | 12.47 | 02.54 | 15.32 | 03.54 | 16.32 | 11.47 | — | 10.47 | 23.11 | 01.09 | 13.47 | 02.09 | 14.47 | 00.39 | 13.17 | 01.54 | 14.32 |
| 18. mar | 01.56 | 14.20 | 00.56 | 13.20 | 01.11 | 13.35 | 03.56 | 16.20 | 04.56 | 17.20 | 00.11 | 12.35 | 11.35 | 23.59 | 02.11 | 14.35 | 03.11 | 15.35 | 01.41 | 14.05 | 02.56 | 15.20 |
| 19. mar | 02.44 | 15.08 | 01.44 | 14.08 | 01.59 | 14.23 | 04.44 | 17.08 | 05.44 | 18.08 | 00.59 | 13.23 | — | 12.23 | 02.59 | 15.23 | 03.59 | 16.23 | 02.29 | 14.53 | 03.44 | 16.08 |

Sig tað uttan rokning



petur & petur • 320870

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

*Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...*

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo